


www.oljan.fo

**Jan Müller** 08 - 03 - 2012

# Atlantic Petroleum borar aftur í Norðsjónum

Føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum hevur nú aftur sett borin í undirgrundina í Norðsjónum, hesaferð á Orchid leitimiðinum, í loyvi P.1556 miðskeiðis í Norðsjónum. Brunnurin verður boraður av pallinum Sedco 711 nærhendis framleiðandi keldurnar Bittern og Kyle. Boritíðin er sett til 35-40 dagar. Fyristøðufelag er oljufelagið Summit Petroleum, sum eigur 45% av loyvinum. Atlantic Petroleum hevur 10%. Aðrir loyvishavarar eru Valiant Petroleum við 30% og Trap Oil við 15%. Bretska felagið Valiant hevur eisini fleiri loyvi á føroyska landgrunninum. Ben Arabo, stjóri sigur, at felagið er sera væl nøgt við at kunna seta hol á boriprogrammið fyri 2012. Í summar fer Atlantic Petroleum at bora Brugdan 2 brunnin í Føroyum og seinni í ár Spaniardbrunnin.